# Kollfirðingar gera innrás í Nor

**Hesa komandi tíðina fara 39 næmingar úr Kollfjarðar skúla at ganga í Norðradali. Hóast vítt er til fjals og fjøru, so sleppa teir bert at spæla í lítla skúlagarðinum. Einki við at fara í bøin, í ánna ella til fjals**

SKÚLAGONGD
*Snorri Brend*

**Norðradalur:** Bygdarfólkið í Norðradali mundu neyvan trúgva sínum egnu eygum tíðliga í gjáramorgunin.

Oman av skarðinum koma tveir bussar koyrandi – ein stórur hvítur og ein minni reyður. Teir koyra ikki skjótt, tí nógv sving eru á vegnum, sum haraftrat er sera smalur.

Í bussunum situr ein hópur av ungum kollfirðingum, sum nú á fyrsta sinni skulu í skúla eftir summarsteðgin. Og sum nú á fyrsta sinni skulu í skúlan í Norðradali.

Bussarnir steðga uttan fyri skúlan, og lítla løtu seinni eru í hópatali av næmingum komnir út. Tey skunda sær inn í skúlan.

Hetta eru børn úr Kollafirði, sum hesa komandi tíðina skulu ganga í Norðradals skúla, meðan teir gera umbyggingina av teirra rætta skúla lidna.

Næmingarnir hava einki ímóti at royna okkurt nýtt. Men tað er tó kortini bæði eitt og annað av tí nýggja, sum ikki er loyvt – nakað, sum køvir hesa gleðina eitt sindur.

Tey sleppa ikki út í bøin. Ikki niðan í fjøllini. Ikki oman í ánna.

- Júst hetta er rættiliga rotið, sigur ein drongur í 6. flokki, sum so avgjørt hevði ætlað sær at fanga síl í ánni í fríkorterunum.

### Hóskandi loysn

Neyvan nakrantíð áður munnu 39 næmingar hava gingið í skúlanum í Norðradali.

Men í gjáramorgunin komu ikki færri enn tveir bussar koyrandi oman móti bygdini, fullir av vónríkum skúlanæmingum úr Kollafirði.

Teirra egni skúli er ikki líðugt umbygdur enn, og tí hevur verið neyðugt at finna aðrar hóskandi loysnir til næmingarnar hesa fyrstu tíðina í nýggja skúlaárinum.

Skipanin er gjørd soleiðis, at 1. til 3. flokkur hevur undirvísing í Royndarstøðini í Kollfjarðardali, meðan 7. og 8. flokkur fáa sína undirvísing í Bygdarhúsinum í bygdini.

Men í Norðradals skúla ganga í dag teir 39 næmingarnir í trimum árgangum í Kollfjarðar skúla – 12 næmingar í 4. flokki, 10 í 5. flokki og 17 í 6. flokki.

Í hesum fyrsta skúladegnum í nýggja skúlaárinum vóru sjálvandi nógvir praktiskir upplýsingar, sum næmingarnir skuldu fáa at vita.

Og hetta gav lærari teirra, Trygvi Samuelsen sær góðar stundir til.

### Møta kl. 8:45

At fara frá einum skúla við 134 næmingum í Kollafirði og til eina lítlan bygdarskúla í Norðradali krevur sjálvandi sína umstilling, bæði hjá lærarum og næmingum.

Í fyrsta lagi byrjar undirvísingin munandi seinni enn áður, og haraftrat munandi seinni enn í øðrum føroyskum skúlum. Næmingarnir verða allir heintaðir við bussum í Kollafirði og síðani koyrdir tann haldur kringluta vegin oman til nýggja skúla teirra. Og heimaftur sama veg.

Soleiðis sum skipanin er við busskoyringini, so ber ikki til hjá hesum næmingum at møta í skúlanum fyrrenn klokkan 8:45.

Á tímatalvuni henda fyrsta mikudagin kl. 8:45 var eingin av vanligu lærugreinunum. Ein kundi heldur kalla tíman fyri "Praktiskir upplýsingar".



Og líkt var til, at teir 17 næmingarnir í 6. flokki lurtaðu væl eftir tí, sum lærari teirra hevði at bera fram.

### Ikki í bøin

Ein tann største broytingin í skúlanum er helst skúlagarðurin.

Børnini hava sjálvandi fríkorter, men tá tey fara út um at spæla, so er skúlagarðurin munandi minni og

# – Rotið ikki at kunnu fanga síl í ánni

**Næmingarnir í 6. flokki fingu fyrr fríkorter í gjár. Tey høvdu frammanundan lagt sær ymsar ætlanir fyri fríkorterini í Norðradali, men lærari teirra greiddi frá, at tey bert máttu halda seg á økinum við skúlan. – Og eg, sum hevði so góðan hug at fara í bøin at fanga kanin-ungar!, læt í einari gentu**

SKÚLAGONGD
*Snorri Brend*

**Norðradalur:** - Hava vit einki fríkorter?!

Lærarin í 6. flokki, Trygvi Samuelsen er í ferð við at skriva tímatalvuna uppá svørtu talvu.

Børnini hava fingið hvør sína tímatalvu útflýggjaða, og skriva nú av eftir tí, sum lærarin skrivar á talvuna.

Hann er komin til fríggjadag, tá ein næmingur brádliga brýtur hann av við oman fyri nevnda spurningi.

Hesin hevur skrivað tað av, sum Trygvi hevur skrivað, men hevur undrað seg yvir, at lærarin einki segði um fríkorterið.

- Jú, góði. Hóast vit eru í Norðradals skúla so fáa tit kortini fríkorter. Eitt fyrrapartin og eitt á middegi.

- Ája, tað var gott, letur síðani í næminginum.



*Skúlagarðurin er ikki so stórur, og tí mugu tey spæla saman. Einki við at krógva seg ella sita einsamallur/einsmøll. Eitt hoppiband kann altíð brúkast*

### Myndatøka

Henda fyrsta skúladagin í Norðradals skúla var tó kortini framd ein broyting í tímatalvuni.

Tey vóru ikki meiri enn innkomin í stovuna, tá tað pikkaði á dyrnar og tveir fremmandir menn sóust í hurðini.

- Nå, blaðmenn. Ja, komið bara innar. Eg eri beint nú í ferð við at greiða teimum frá nýggju umstøðunum her í skúlanum.

Trygvi Samuelsen heldur síðani fram við framløgu síni um nýggja skúlaárið, og ikki minst nýggju tímatalvuna, sum nú skal setast í verk her í skúlanum.

Skúlagongdin byrjar hvønn dag kl. 8:45 og endar kl. 13:00. Soleiðis sum skipanin er, verða tey flutt úr heimbygdini og í skúlan við bussum. Annar teirra koyrir skúlabørnini av Signabø og hin tekur børnini norðuri úr Sundum.

Myndamaðurin vil fegin hava tey útum eina løtu til myndatøku. Tað hevur lærarin einki ímóti. Og heldur ikki næmingarnir.

Skúlagongdin verður allar dagarnar bert til kl. 13, hóast tímatalvan mánadag og týsdag sigur, at vallærugreinarnar eru eftir hesa tíð.

Tað verða tær ikki, so leingi skúlagongdin er í Norðradals skúla.

### Ikki í bøin

Skúlagarðurin er munandi minni og munandi øðrvísi